# Reglugerð fyri árligu landsseyðasýningina, sum Búnaðarstovan skipar fyri

## FYRSTI PARTUR, UM SÝNINGINA, LUTTØKU OG DÓMARAR

§1, um landsseyðasýningina

Landsseyðasýningin er árlig, almenn seyðasýning, sum Búnaðarstovan skipar fyri, tá tær lokalu sýningarnar hava verið. Landsseyðasýningin fer fram á tann hátt, at sýnsmenn, sum Búnaðarstovan hevur útnevnt, fara út í økini at sýna. Lýsast skal í bløðunum og á heimasíðuni í góðari tíð frammanundan. Tilmeldingarfreistin skal verða løgd soleiðis, at sýnsmenn kunnu veljast, eftir at tilmeldingarfreistin er úti. Búnaðarstovan setir seg í samband við ein persón úr økinum, sum samlar vinnandi seyðirnar á einum stað.

Stk. 2: Búnaðarstovan hevur ábyrgd av øllum fyrireikingum áðrenn sýningina og hevur ábyrgd av, at tað, sum fyriferst undir sýningini, er eftir galdandi reglum fyri sýningina. Búnaðarstovan skal tryggja sær, at øll útgerð til sýningina er tøk og í góðum standi.

Stk. 3: Búnaðarstovan skal merkja sær, hvussu sýningin gongur, og hvørjar ábøtur kunnu gerast. Tá sýningin er liðug, skal Búnaðarstovuna gera frágreiðing við úrslitum og eftirmeta sýningina við atliti til møguligar betringar til komandi sýning.

§2, luttøkukrøv til seyð

Fyri at luttaka í landsseyðasýningini skal seyðurin vera frískur, og tað skal vera staðfest við ílegukanning, at hann hevur mótstøðuføri móti ridluskriða. Búnaðarstovan tilskilar sær rætt til at taka nýggja blóðroynd av luttakandi seyðunum.

Av tí at ridluskriði er staðfestur í Streymoy, Eysturoy og Fugloy skal seyður úr hesum oyggjum hava AA í Codon 136, t.v.s. eina av ílegusamansetingunum í teimum grønu og gulu bólkunum. Seyður úr restini av landinum skal hava antin AA ella AV í Codon 136, t.v.s. eina av ílegusamansetingum í fýra teimum ovastu bólkunum. Seyður við VV í Codon 136, í reyða bólkinum, kann ikki luttaka í landsseyðasýningini.

Sí annars dagførdu alitalvuna hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovu frá 2.11.2016:

| Codon 136 | Codon 154 | Codon 171 | Mótstøðuføri |
|---|---|---|---|
| AA | RR | RR | Seyður við hægst mótstøðuføri fyri ridluskriða. Sera væl egnaður til aling (at seta við). |
| AA | RH | RR | |
| AA | HH | RR | |
| AA | RR | QR | Seyður við høgum mótstøðuføri fyri ridluskriða. Væl egnaður til aling. |
| AA | RH | QR | |
| AA | HH | QR | |
| AA | RR | QQ | Seyður, ið hevur mótstøðuføri fyri ridluskriða. Kann nýtast til aling. |
| AA | RH | QQ | |
| AA | HH | QQ | |
| AV | RR | RR | Seyður, ið kann geva "V" í codon 136 víðari til lombini. Eigur ikki at nýtast til aling í oyggj har ridluskriði er staðfestur. |
| AV | RH | RR | |
| AV | HH | RR | |
| AV | RR | QR | |
| AV | RH | QR | |
| AV | HH | QR | |
| AV | RR | QQ | |
| AV | RH | QQ | |
| AV | HH | QQ | |
| VV | RR | RR | Seyður, ið gevur "V" í codon 136 víðari til lombini. Eigur ikki nýtast til aling. |
| VV | RH | RR | |
| VV | HH | RR | |
| VV | RR | QR | |
| VV | RH | QR | |
| VV | HH | QR | |
| VV | RR | QQ | |
| VV | RH | QQ | |
| VV | HH | QQ | |

Stk. 2: Fyri at luttaka, skal seyðurin vera góðkendur í einari lokalari seyðasýning í einum av sýnsøkjunum, sum Búnaðarstovan hevur ásett. Einans seyður, sum er sýnaður av í minsta lagi trimum sýnarum, harav minst tveimum við prógvi frá Búnaðarstovuni, hevur atgongd til landsseyðasýningina. Búnaðarstovan skal tó hava góðkent allar 3 sýnararnar til hvørja lokalsýning.

Stk. 3: Frá hvørjum øki kunnu meldast til: 3 veðragjólingar, 3 veturgamlir- og 3 eldri veðrar, og treytin er, at teir hava fingið í minsta lagi 1. virðisløn.

Stk. 4: Seyður, sum verður meldaður til landsseyðasýningina, skal hava serstakt loyvi, sum fæst frá sýnarunum. Loyvið skal vera dagfest og undirskivað av teimum í stk. 2 nevndu sýnarum og sendast Búnaðarstovuni við tilmelding.

Stk. 5: Allir veturgamlir- og eldri veðrar, sum verða meldaðir til landsseyðassýningina, skulu á hvørjum vetri verða gjørdir upp til at brunda sbrt. § 17. í Hagalógini, sum ásetur, at veðragjólingur verður gjørdur upp fyri hvørjar 33 ær og veðrur fyri hvørjar 40 ær í haganum.

Stk. 6. Eldri veðrar skulu í mesta lagi vera trævetur gamlir fyri at kunna vera við í árligu landsseyða-sýningini.

Veðrar, sum ikki hava brundað, ella ikki hava havt møguleika at brunda sbrt. § 17. í Hagalógini, kunnu ikki luttaka í landsseyðasýningini.

## ANNAR PARTUR, UM DØMING

§3, dómarar og útgerð

Búnaðarstovan velir 5 dómarar og ein skrivara. Hesir skulu treytaleyst ganga undir reglugerðina fyri sýningina. Einans dómari, sum er góðkendur av Búnaðarstovuni, hevur loyvi at døma á landsseyðasýningini.

Stk. 2: Dómararnir skulu vísa virðiligan atburð undir sýningini. Er ivi um gegnið hjá dómara, skal hann alt fyri eitt boða samskiparanum frá og taka avleiðingarnar av ógegni. Ógegnigur til landsseyðasýningina er dómari, tá hann er eigari, upprunaligur eigari av seyði sum luttekur á sýningini, ella røktari í haga, sum hevur seyð á sýningini.

Stk. 3: Tað er ábyrgd hjá hvørjum einstøkum dómara at kunna seg um reglurnar.

Stk 4: Tá sýningin byrjar, fær hvør dómari ein dómaraseðil við yvirliti yvir hvønn einstakan seyð. Seyðurin verður sýnaður eftir einum skala frá 0 – 10, og stig verða givin í fimm teigar fyri ávikavist frambein, afturbein, horn, ull og heildarmynd. Harumframt ein teigur til viðmerkingar.

§4, dømingin

Seyðirnir verða sleptir í eitt rúm til metingar. Metingarrúmið skal vera ljóst og rúmligt, umleið 2 x 6 metrar, eisini **skal** teppi vera sum undirlag. So vítt gjørligt skulu tveir seyðir vera inni í senn. Myndir verða tiknir av hvørjum seyði.

Stk. 2: Dómararnir sýna sjálvstøðugt, og tá liðugt er at sýna, verða hægsta og lægsta úrslitið tikin burturúr, og miðalið av hinum trimum verður galdandi.

Stk. 3: Vakrastu veðragjólingar og veðrar - nr. 1, 2 og 3 - verða endaliga valdir út á Búnaðarstovuni. Umframt stigini hava sýnsmenninir eisini myndirnar at styðja seg til. Sýnsmenninir velja hvør sær tríggjar teir vakrastu seyðirnir millum teir átta, ið hava fingið flest stig. Tó kunnu bert seyðir veljast, ið hava fingið 6 stig ella meira í øllum teigum frá teimum trimum dómarunum, sum eru eftir, tá hægsti og lægsti eru tiknir burturúr. Fyrst velja teir og avgreiða nr. eitt. Stendur á jøvnum millum tveir seyðir, skulu sýnsmenninir velja umaftur millum hesar. Stendur á jøvnum millum fleiri enn tveir seyðir, fellur avgerðin við lutakasti.  Síðani velja teir og avgreiða nr. tvey á sama hátt sum nr. eitt, og til seinast velja teir nr. trý á sama hátt.

Kollafjørður, hin 14. september 2023

Búnaðarstovan